UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 8. september 2021
J.nr.: 21/16815-3
At tilskila í svari

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-025/2021 frá Anniku Olsen, løgtingsmanni, um integratión

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Nær kann integratiónslógin væntast at koma í Tingið?*
2. *Verður neyðug játtan sett av á fíggjarlógini til málmenning v.m. fyri útlendingar og útlendsk børn?*
3. *Verður tað eitt krav, at útlendingar skulu hava lokið skeið í føroyskum fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi?*
4. *Verður nakað gjørt fyri at fáa útbúnar kvinnur í størv, ið eru hóskandi til teirra útbúgving?*
5. *Nær kann greiða fáast á truplu umsitingini av útlendingamálum, serliga hvat viðvíkur arbeiðs- og uppihaldsloyvum?*

Svar

1. Umhvørvis- og vinnumálaráðið arbeiðir í løtuni við uppskoti til løgtingslóg um integratión. Við hesum uppskoti verða gjørdir karmar fyri, hvussu integratiónsfremjandi tiltøk skulu fyriskipast, ásetingar um integratiónssamrøður og integratiónsætlanir, vegleiðing og ráðgeving, eins og ásetingar verða um rættindi og skyldur hjá teimum, ið eru fevnd av lógini. Roknað verður við, at uppskot til løgtingslóg um integratión verður lagt fyri Løgtingið seinni í ár.

Komandi løgtingslógin um integratión verður sum nevnt ein karmur um integratiónsfremjandi tiltøk, men væleydnað integratión kann væntast at krevja munandi meira enn tað, sum almennir myndugleikar, bæði landsmyndugleikar og kommunalir myndugleikar, lyfta einsamallir. Tað er tí sanniliga eisini neyðugt, at sivilsamfelagið í breiðari merking – arbeiðsgevarar, borgarar, felagsskapir, ítróttarfeløg, kirkjur og samkomur – tekur lógvatak saman fyri at fáa útlendingar í Føroyum við í vanliga lívið hjá føroyingum kring landið.

2. Uttanríkis- og mentamálaráðið upplýsir, at játtanin til undirvísing fyri vaksin innan frítíðarundirvísingina er hækkað munandi úr 800.000 kr. í 2019 upp í 1,9 mió. kr. í 2021.

Við vaksandi talinum av borgarum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál, verður tørvur á at hækka játtanina til undirvísing av vaksnum tilflytarum, og tørvur verður á at skapa umstøður annars fyri, at vaksnir tilflytarar fáa møguleika fyri at fylgja intensivari undirvísing í

føroyskum sum annaðmál. Í hesum sambandi er gjørd námsætlan eftir altjóða CEFR-leistinum fyri undirvísing av vaksnum tilflytarum.

Játtanin til undirvísing av fremmandmæltum børnum í fólkaskúlanum er eisini hækkað nakað í 2021 við 1,4 mió. kr., og tað verða játtaðar til samans 4,8 mió. kr. til endamálið í 2021. Miðað verður eftir at skapa rúm fyri til dømis at seta móttøkuflokkar á stovn og at hækka tímajáttanina til fremmandmælt børn í fólkaskúlanum.

Nýggj kunngerð er sett í gildi, sum heimilar og setur karmarnar fyri undirvísing av fremmandmæltum børnum í fólkaskúlanum. Nú í september fara fleiri enn 30 lærarar í skúlaverkinum undir eftirútbúgving, og arbeitt verður við at útvega undirvísingartilfar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, umframt onnur átøk, sum hava til endamáls at tryggja góða integratión.

3. Løgtingið samtykti á vári 2019 eina broyting í útlendingalógini, sum heimilar danska ráðharranum, eftir tingingar við landsstýrið, at áseta reglur um, at varandi uppihaldsloyvi kann verða treytað av, at útlendingurin hevur *integrationsrelevant tilknytning til Færøerne*, t.e. m.a. málkunnleiki.

Sum nevnt hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið upplýst, at málskeiðini eru um at vera klár, og ætlanin er tí at fara undir tingingar við danska ráðharran um at seta reglurnar í gildi fyri Føroyar. Hesar reglur verða settar í gildi við heimild í útlendingalógini.

4. Komandi integratiónslógin hevur til endamáls at fremja góða integratión, og hetta skal gerast við at tryggja, at tilflytarar fáa møguleika at gagnnýta sínar førleikar og síni evni á ein hátt, sum gevur teimum møguleika at forsyrgja sær sjálvum og annars at luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar og í samsvari við grundleggjandi virði og normar í samfelagnum.

Hetta eru høg mál, sum vit mugu stremba eftir at røkka, tí tað verður til fyrimuns fyri øll, um vit til fulnar gagnnýta teir førleikar, sum eru í samfelagnum. Hetta vísir aktuella støðan á arbeiðsmarknaðinum, eins og tær avbjóðingar, sum fara at koma á vælferðarøkinum við vantandi starvsfólkum, okkum. Við komandi integratiónslógini fara vit at fáa nøkur góð amboð at røkka hesum málum, og tá verður tað ein uppgáva hjá almennu Føroyum, bæði landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum at tryggja, at tey, sum velja at flyta til Føroya at liva og virka, fáa høvi at geva sítt íkast til samfelagið á ein týðandi hátt.

Uttanríkis- og mentamálaráðið arbeiðir við at fyrireika skipanir sum tryggja, at starvsfólk kunnu verða førleikamett, og at tey við tillagingum kunnu fáa starvsroyndir og prógv viðurkend. Í løtuni ber kortini ikki til at siga, nær komið verður á mál við hesum arbeiði.

5. Danski ráðharrin í útlendingamálum fekk í 2019 heimild at lata føroyskar myndugleikar umsita part av útlendingamálum, undir hesum eisini heimild at taka avgerð í fyrsta instansi í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi o.a. Í løtuni verður fyrireikað at yvirtaka hesa avgerðarheimild. Umsitingin á Útlendingastovuni hevur sum liður í hesum fingið størri starvsfólkaorku.

Roknað verður við, at málsviðgerðartíðin í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi verður styttri, tá ið umsitingin av hesum er fingin á føroyskar hendur.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 8. september 2021

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður